# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Annað skinn um bak

Javnaðarflokkurin hevur fingið eitt álvarsamt skot fyri bógvin í veljarakanning, sum Fynd hevur gjørt fyri blaðið. Hetta er nakað, sum má fáa øll ávaringarljós at blinka. Løgmaður hevur her í blaðnum gjørt sínar viðmerkingar, og niðurstøður hansara eru í høvðusheitununm, at Miðflokkurin hevur so at siga sett seg á virðini, og at hann rekur ein populistiskan politikk. Hartil kemur, at flokkur løgmans ikki hevur verið nóg sjónligur og ikki hevur megnað at "selja" boðskapin.

Tað er vælskiljandi, at floksformaður málber seg soleiðis, men ein óheftur eygleiðari vildi skjótt komið til ta niðurstøðu, at hesar metingar ikki røkka til at forklára alla afturgongdina. Hetta má stinga djúpari. At flokkur, sum hevur havt ein trúgva veljaraskara kavar úr 21,8% niður á 18,4 má hava eina ella fleiri aðrar orsøkir, og tað vildi ivaleyst verið skilagott av leiðslu Javnaðarfloksins at roynt at funnið fram til hesar orsøkir.

Hvørjar kunnu hesar so vera? Tað kann hava nakað at gera við, at flokkurin hevur verið støðugt undir álopi frá andstøðuni og frá fakfeløgunum. Hartil kemur, at hóast floksins landsstýrisumboð hava sýnt framúr dugnaskap, so hevur floksins javnaðarprofilur verið kámur og ógreiður. Hetta at flokkurin mestsum ókritiskt hevur ættleitt frælsu marknaðarkreftirnar, hetta at flokkurin, sum tað tyksit, uttan víðari hevur góðtikið einskiljingarnar, og so tað teknokratiska dæmi, flokkurin hevur fingið, ja, tað má kosta stuðul og atkvøður.

Javnaðarflokkurin kann enn náa at læra av t. d. norska bróðurflokkinum. Hví stóð hann seg so væl til stórtingsvalið og kommunuvalið? Jú, tí flokkurin og serstkliga formaðurin, Jens Stoltenberg, hildu rimmarfast við Arbeiðaraflokkins grundleggjandi virði. Hetta átti givið Javnaðarfloksins leiðslu nakað at hugsa um. Enn er tíð til at taka annað skinn um bak.

**Sosialurin**

## Føroya flogvøllur – eitt lokalpolitiskt mál í Havn?

**GUNNAR K NATTESTAD**



Í eini tíð har talað verður um at knýta alt landið saman í eitt valdømi, er hugstoytt at síggja nógv framstandandi fólk í høvuðsstaðnum skjóta hamin og avdúka seg sum blindar lokalpatriotar. Hettar er í hvørtfall niðurstøðan eftir at hava lisið greinarøðina í Vinnuvitan 6. september.

Tað er lítið nýtt í, at fleiri altíð hava vilja, at stórtsæð alt, ið verður bygt her á landi skal liggja í Havnini. Poul Michelsen er einki eindømi. Hann hevur gjørt nógv gott vinnuligt og politiskt, men projekt sum Havnin á Sundi og kanska Tórsvøllur vitna um, at fagrir dreymar eisini kunna enda sum ein marra; serstakliga tá grundarlagið í stóran mun byggir á kenslur og ynski um at sætta Havnini og ongum øðrum.

**Vinnumálaráðharri við fjaldari dagskrá?**

Bjarni Djurholm hevur sitið sum avvarðandi at flogvallarmálinum í meira enn 7 ár, og hesa tíð er lítið og einki hent føroyska flogvøllinum at bata. At hugsa sær at maðurin hevur arbeitt alla hesa tíð við málinum og einki hava at vísa á!

Men nú kemur so sannleikin enn einaferð á borðið – tað skal einki henda við verandi flogvølli, tí Bjarni vil hava flogvøllin til Havnar. Hann sigur tó so mikið, at hann má útseta hesa ætlan eina tíð, til fakligar grundgevingar eru komnar undan kavi.

Fyri hvønn dag, ið gongur hendur so í hvørtfall tað, at verandi flogvøllur verður meira og meira afturútsigldur. Men nú pengarnir eru klárir, er vandi fyri at hesin taktikkurin ikki riggar meira, og helst er tað tí, at onkur byrjar at ýla. Við eini dagføring av flogvøllinum í Vágum kann vantast, at regulariteturin, ið undir verandi umstøðum liggur ovast í teimum 90 prosentunum – fer at gerast enn betur.

Havast skal tó í huga, at líka mikið hvat vit gera fyri at betra um flogvallarviðurskiftini, so fer flogvøllurin framvegis at liggja í Føroyum, og hettar setur sínar natúrligu avmarkingar fyri regulariteti.

**Vinnuvitan og trúðvirðið**

"Eingin profetur er virdur í síni egnu tíð" er orðatak frá skriftini. Um oddagreinin í Vinnuvitan hevur lítið virði grundað á hesa útsøgn, skal vera upp til hvønn einstakan at taka støðu til, men at tað er í tí profetisk at uppáhaldini byggja, kann ikki komast burtur frá.

Hóast ongar óheftar kanningar, tíðans heldur úrslit og niðurstøður, peika á góðan flogvølli á Glyvursnesi, so "veit" Vinnu-"vitan" tað sum eingin annar veit, nevnliga at "peningur til útbygging í Vágum er burtur spiltir skattapengar", "einasta rætta staðið at byggja nýggjan flogvøll er á Glyvursnesi" og "Mjørki verður eingin trupulleiki á einum flogvølli á Glyvursnesi, tí innflúgvingtarviðurskiftini eru nógv betri enn í Vágum."

Heilt erligt hvat bíða vit eftir? Hví tekur Vinnuvitan ikki bara sjálvt og byggir ein flogvøll á Glivursnesi. Teir hava jú alla vitan??? Kanska fara rúmdarferjur at lenda her, tá Glivursnes er liðugt? Møguleikarnir eru óavmarkaðir...

**Er Havnin eitt argument í sær sjálvum?**

Vit mugu tó geva Vinnuvitan rætt í tí, at líkamikið hvat, so vilja nøkur hava flogvøll bygdan á Glyvursnesi. Tað er ikki brúk fyri sakligum og faktuellum grundgevingum, nei – Glivursnes liggur í Havnar kommunu, og tað er grundgeving í sær sjálvum. At so vandi er fyri at dreymurin blívur ein marra og at kanska tvær milliardir blíva brúktar til ein verri flogvøll enn tann vit hava nú; tað ger minni.

**Avleiðingar fyri valdømis málið?**

Havandi í huga grundaða ivan nógv fólk hava, serliga úti um landið, um eitt vældømi verður endin á framtíðini hjá øllum uttan fyri miðstaðarøkið, so kann ivin sigast at vera nógv undurbygdur í og við tí hugburði Pól, Bjarni og leiðslan á Vinnuvitan hava víst.

Eitt er víst - við einum valdømi verður tað bert í Havnini, at tað framhaldandi verður møguleiki at blíva valdur upp á lokalpolitikk; og tað sær út til at vera nokk av fólki, ið bjóða seg fram at á tí listanum.

## Treytaleys umbering til sandsprest

**JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD**



Sandsprestur, Jákup Reinert Hansen hevur gjørt vart við, at hann harmast um mína samanbering millum hann og fornu sandsprestarnar Harra Klæmint og Kálv Lítla. Sandsprestur heldur, at samanberingin kann skiljast sum hann hevur somu eginleikar sum hesir báðir prestar í teirra dagliga levnaði.

Higani verður biðið um treytaleysa umbering fyri at eg hava orðað meg so klossut, at lesarin kann halda, at Jákup Reinet Hansen er sami jassur sum Harra Klæmint og Kálvur lítli.

Samanberingin bygdi einans á, at Jákup Reinert Hansen hevur verið so trúgvur í tænastu í Todnesi, at hann minnir um sínar undanmenn hesum viðvíkjandi og bara hesum. Kálv Lítli var seinasti katólski presturin í Sandoynni og var tiltikið illmenni. Hann endaði sínar dagar undir bøðilsins hond. Harra Klæmint var prestur mong ár eftir. Hann kom til Føroyar blóðfátækur, og tá hann andaðist átti hann 60 merkur í ognarjørð. Hann er enn ímyndin av kraddaralyndi og óreiðiligheit. Hetta stendur at lesa Færøske Folkesagn og Eventyr, bind 1. eftir Jakob Jakobsen.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.